## Turrur fiskur í Tipsbladet

"Guldkæder av tørfisk". Tað er sambært danska Tipsblaðnum tað, sum spælararnir úr EB/Streymi vórðu heiðraðir við, tá teir týskvøldið tryggjaðu sær meistaraheitið. Um blaðið kennir nakað til føroyskar greipur, men vera rættiliga ivasamt, men tað verður tó staðfest, at EB/Streymur vissaði sær meistaraheitið, umframt at trivið verður í góðu avrikini hjá felagnum ímóti Manchester City í summar.



## Spæla kl. 13.00 og 15.30

Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, nær spælast skal seinastu umførini. Reglurnar áseta nevnliga, at liðini tá skulu spæla samstundis. Leygardagin verður hetta so gjørt á tann hátt, at allir dystirnir í 1. deild byrja klokkan 13, og í Formuladeildini verður so bríkslað ígongd klokkan 15.30.

EB/Streymur-HB:

# Klárt til fótbóltsveitslu

**Gummibeinini vórðu løgd á Skála, og nú gleða teir í EB/Streymi seg bara til enda árið ordiliga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*FM-veitslan byrjaði á Skála týskvøldið, og hóast gleðin kanska ikki verður heilt so euforisk, sum hon var týskvøldið, so er eingin ivi um, at bæði Egil og mest sum øll bygdafólkini frá Kollafirði til Eiðis gleða seg til stóru løtuna leygardagin*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

- Tað var nú óluksáligt, at mann ikki stillaði upp til kommunuvalið. Tað skuldi í øllum førum ligið væl fyri at fiskað nakrar atkvøður leygarkvøldið.

Orðini eigur Egil á Bø, sum leygardagin klokkan knappliga hálvgum seks skal taka ímóti Formulasteypinum, sum fær pláss undir liðini av Løgmanssteypinum í felagshúsinum við Margáir.

### Spæla frítt

Seinasti dysturin á kappingarárinum hjá EB/Streymi verður móti HB, og hetta ger ikki dagin minni hugaligan sigur Egil.

- Vit vilja sjálvandi enda árið væl, og tað ger tað ikki minni stuttligt, at tað júst er HB, sum vit spæla ímóti. Og mest av øllum vilja vit vísa, at vit eru betri enn teir. Eisini hóast hetta longu er staðfest á stigatalvuni.

- Og tá bæði liðini kunnu spæla frígjørt, rokni eg eisini við, at tað verður ein stuttligur dystur at hyggja eftir. Gummibein verður talan so ikki um hesaferð, so spurningurin er heldur, hvussu spælararnir reagera, nú vit ikki hava gummibein, flennir Egil.

### Spældu borðtennis

Eftir at FM-sigurin varð feiraður týskvøldið, hildu spælararnir frí mikudagin.

Hósdagin hittist hópurin aftur, men hesa ferð var talan um borðtenniskapping heldur enn fótbólt. Eina kapping, sum hjálparvenjarin hjá liðnum, Finnbjørn Zachariassen, vann saman við Sorin Anghel. Her kann leggjast afturat, at Finnbjørn er fyrrverandi landsliðsspælari í borðtennis, og tí varð hann roknaður sum stórfavorittur undan innan hýsis kappingini.

- Men hetta er nú ikki, tí vit ikki taka uppgávuna í álvara. Heldur haldi eg, at lagið í hópinum nú er framúr, og um vit spæla borðtennis eitt kvøld heldur enn fótbólt, man ikki gera tað heilt stóra. Venjingarstøðan skuldi í øllum førum verið í lagi, nú vit bert hava ein dag eftir av kappingarárinum, sigur Egil á Bø.

# B36 spælir fyri bronsuni

**Jákup á Borg er leikbannaður, nú væl nøgdu toftamenninir koma at vitja í Gundadali**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Týsdagin misti B36 møguleikan at vinna silvurmerkini. Í morgin spælir árstalsfelagið í høvuðsstaðnum fyri at vinna bronsukrónurnar. Mótstøðuliðið verður B68, sum hevur staðið seg væl betri, enn uppflytarar ofta gera.

Oddmar Færø er tøkur aftur hjá B36, eftir at hann týsdagin var leikbannaður. Týsdagin sá Jákup á Borg reytt, og tískil er hann longu farin í vetrarfrí.

Enn hevur einki verið at hoyrt um, hvussu tað verður við venjara í B36 og í B68. Einki man tó vera at ivast í, at avrikini hjá Heðini Askham og Bill Jacobsen hava verið so mikið góð, at teir eru í høgum metum í feløgunum báðum.



*B36 hevur longu vissað sær sætið í Europa. Sunnudagin spæla teir fyri bronsumerkjunum*